# Løgmaður atfinningarsamur ímóti stjórnarskipanaruppskoti

**Álit um nýggja stjórnarskipan er handað løgmanni, har m.a. minniluta-viðmerkingar eru prentaðar. M.a. fýlist Jóannes Eidesgaard serliga á, at løgmaður ikki longur skal hava møguleika at útskriva nýval, og at løgtingsformaðurin í framtíðini møguliga skal staðfesta lógir, sum annars tað útinnandi valdið plagar at gera**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Mánamorgunin handaði Jóan Pauli Joensen, formaður í Stjórnarskipanarn evndini, løgmanni álit um stjórnarskipan Føroya.

Sambært lóg skuldi hetta sokallaða Jólaálitið handast fyri nýggjársaftan í ár.

Seinastu tíðina hevur nevndin lagt seg eftir at kunna fólk kring landið um uppskotið til ta nýggju stjórnarskipanarlógina, og fleiri kunningarfundir hava verið hildnir.

Í fororðinum í álitinum rør formaðurin framundir, at føroyingar skulu hava møguleika til at siga, hvat teir halda um uppskotið til nýggja stjórnarskipanarlóg. Í hesum sambandi eru eisini minnilutaviðmerkingar til álitið prentaðar í tí snøgga bóklinginum, sum hýsir uppskotinum.

Fleiri av hesum viðmerkingum eru ikki sørt kritiskar til ta nýggju stjórnarskipanarlógina.

Umframt serfrøðingar sleppa politikarar eisini framat við sínum viðmerkingum.

M.a. er Jóannes Eidesgaard, løgmaður og nevndarlimur í stjórnarskipanarn evndini, atfinningarsamur, og hann sigur seg ikki taka undir við at broyta heitið landsstýrismaður til ráðharri. Hann skrivar m.a.:

*"Eri eg sannførdur um, at tey heitini, sum hava vunnið sær hevd, skal mann ikki beina burtur. Landsstýrismaður er serføroyskt, meðan ráðharri ella ministari er tað heitið, sum øll onnur brúka. Tí haldi eg uppá, at vit eiga at brúka heitið landsstýrismaður.*

*Av júst somu grund haldi eg, at heitið løgmaður, sum síðan 1948 hevur merkt formaðurin fyri landsstýrinum, hevur vunnið sær hevd í hesum týdninginum.*

*Tí er tað als ikki rætt at gera eina áseting, sum letur upp fyri møguleikanum at venda aftur til gamla týdningin fyri formannin í Løgtinginum.*

*So kundi eins væl verið umhugsað at brúkt hetta heitið til hægsta embætið í rættarskipanini.*

*Eg mæli tískil frá at samtykkja tær ásetingar í § 59, sum snúgva seg um umskipan av løgmansembætinum".*

### Ímóti lógarásettum uttanríkisráðharra

Jóannes Eidesgaard sigur seg heldur ikki taka undir við, at einasti landsstýrismaður, sum er nevndur í uppskotinum til nýggja stjórnarskipan, er landsstýrismaðurin í uttanríkismálum.

*"Eg síggi, at við hesum uppskotinum um landsstýrismann í uttanríkismálum/varaløgmann við heimildum, sum eru fyriskrivaðar í stjórnarskipanini, verður gamla siðvenjan tikin burtur, at tað er løgmaður, sum býtir málsøkini út, tí hetta málsøki er givið frammanundan. Ein fær næstan ta kenslu, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum fær meira rúmd í hesum uppskoti enn løgmaður, og tá er lagt á heilt annan bógv. So hesum taki eg als ikki undir við",* skrivar løgmaður millum annað.

### Løgmaður hava staðfestingarrætt

Jóannesi Eidesgaard dámar heldur ikki, at skotið verður upp, at løgmansembætið kann umskipast við tinglóg.

*"Hetta er sera óheppið fyri lógararbeiðið.*

*Vit gera eina stjórnarskipan, sum hevur truplar mannagongdir fyri broytingum, men so verður sagt í sambandi við eitt sera týdningarmikið embæti, at tað kann umskipast við tinglóg – tað ber ikki til. Hetta er í andsøgn við grundarlagið fyri stjórnar skipanarsmíðinum, tí hugsanin er, at grundleggjandi broytingar krevja broytingar í stjórnarskipanini. Tað er sera løgið, og í stríð við andan í teirri nýggju skipanini, at staðfestingarrætturin hjá løgmanni kann flytast til tingformannin við tinglóg. Staðfestingarrætturin er ein so týdningarmikil og grundleggjandi heimild hjá útinnandi valdinum, at tað er ikki rætt at taka hesa heimild frá løgmanni, og kann tað, sambært uppskotinum, fremjast við broyting í tinglóg (sí § 59, stk. 3). Staðfestingarrættin skal løgmaður hava, og skulu broytingar fara fram hesum viðvíkjandi, skal henda grundleggjandi broytingin fremjast við broyting av stjórnarskipanini".*



*- Tað er sera løgið, og í stríð við andan í teirri nýggju skipanini, at staðfestingarrætturin hjá løgmanni kann flytast til tingformannin við tinglóg, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

### Løgmaður útskriva val

Jóannes Eidesgaard metir eisini, at løgmaður í framtíðini skal hava møguleikan at útskriva val.

*"Tá ið verandi stýrisskipanin kom í gildi í 1995, var ein týdningarmikil partur hetta, at tað var ein ávís valdsjavnvág millum løgting og landsstýri. Tí fekk løgmaður møguleikan at skriva út val. Hetta hava vit havt góðar royndir av, kanska ikki tær, ið vit hoyra um, men serliga tær, sum vit ongantíð hoyra um. Tí taki eg ikki undir við, at løgmaður missir henda møguleikan, og eg haldi, at valdssúlurnar forskjóta seg, um hesin rættur verður tikin frá løgmanni. Eg rokni eisini við, at vit kunnu vænta óstabilari politisk viðurskifti, um hesin rættur verður tikin frá løgmanni.*

*Samanblandingin av fólkavaldum tingformanni/ løgmanni, forseta ella kongi, virkar púra órealistisk. Hví verður útgangsstøðið ikki tikið í tí veruleika, sum vit liva í? Eg meini, at tá ið fullveldið er vorðið ein veruleiki, so eru vit væl saktans eisini før fyri at broyta hesa stjórnarskipanina",* skrivar Jóannes Eidesgaard m.a. í nýggja Jólaálitinum.

# Høgni Hoydal: Stjórn heldur enn landsstýri

**Høgni Hoydal metir, at vit heldur eiga at brúka orðið stjórn enn landsstýri, og at møguleiki fyri einum forsetaembæti skal vera nevnt í stjórnarskipanarlógini**



*Høgni Hoydal metir, at fólkavalt forsetaembætið skal vera møguligt sambært stjórnarskipanarlógini*

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum og nevndarlimur í stjórnarski panarnevndini, skrivar í sínum minnilutaáliti í Jólaálitinum, at ein stjórnardepil átti at verið settur á stovn, *"ið kann tryggja, at hetta arbeiðið ikki endar eins og vit hava sæð fyrr við stýriskipanarlógini, at partapolitikkur og samgongu/andstøðuspurningar taka yvir".*

Høgni Hoydal sigur seg taka undir við at broyta tey hugtøk, ið hava verið nýtt um tey ymisku vøldini hjá tí føroyska heimastýrinum.

*"Eg undrist á, at hugtakið „landsstýri" framvegis gongur aftur í uppskotinum, vit hava fingið sendandi. Tað var ikki tað, ið stóð, tá undirnevndin hevði sín síðsta fund.*

*Tá nýttu vit hugtakið „stjórn", ið eisini samsvarar við hugtøkini annars (stjórnarstovnar o.a.). Fari at mæla til, at nýta tað, sum lá á borðinum, tá undirnevndin endaði. Alt annað vildi verið skeivt",* skrivar Høgni Hoydal, sum eisini kundi hugsað sær, at tað stóð bæði í formælinum og í grein 1 tí nýggju stjórnarskipanarlógini, at *"føroyska fólkið hevur evsta valdið í Føroyum".*

Høgni Hoydal metir, at fólkavalt forsetaembætið skal vera møguligt sambært stjórnarskipanarlógini. Tó heldur formaður Tjóðveldisfloksins, at møguleikin í stjórnarskipanarlógini fyri, at løgmaður kann seta landið í undantaksstøðu, avgjørt eigur at strikast.

# Kaj Leo Johannesen: Undir donsku grundlógini

**Í minnilutaáliti skrivar Kaj Leo Johannesen m.a., at nýggja uppskotið um stjórnaruppskotið fløkir tey trý statsvøldini saman, og at grindadráp ikki hoyrir heima í hesi lóg. Somuleiðis krevur hann, at stjórnarskipanarlógin verður undir donsku grundlógini**



*Kaj Leo Johannesen heldur, at hendan lógin skal koma í staðin fyri verandi stýrisskipanarlóg og skal vera á sama rættarstigi sum hendan - tað vil siga undir donsku grundlógini og Heimastýrislógini*

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, hevur vegna sín flokk skrivað nakrar viðmerkingar í tað nýggja Jólaálitið. Hann metir tað m.a. vera neyðugt at staðfesta, hvørjum rættarstigi tann nýggja stjórnarskipanarlógin skal vera á.

*"Sum heild er Sambandsflokkurin av teirri fatan, at fyriliggjandi uppskot fløkir tað tríbýtta valdið óneyðuga nógv saman. Eisini metir flokkurin, at tað er týdningarmikið, at sligið verður fast, á hvørjum rættarstigi stjórnarskipanarlógin skal vera. Sambandsflokkurin er av teirri fatan, at henda lógin skal koma í staðin fyri verandi stýrisskipanarlóg, og skal tí vera á sama rættarstigi sum hendan (tað vil siga undir donsku grundlógini og Heimastýrislógini). Sambandsflokkurin ynskir tí, at lógin verður orðað soleiðis, at eingin ivi kann vera um hetta".*

### Burtur við grindadrápi, landsbanka og búskapargrunni

Kaj Leo Johannesen skrivar eisini, at Sambandsflokkurin er ímóti, at møguleikin at útskriva val verður tikin frá løgmanni. Harafturat er flokkurin ímóti at løgmaður skal kunna verða valdur beinleiðis av veljarunum. Sambandsflokkurin er somuleiðis ímóti, at tað skal standa í stjórnarskipanarlógini, at Føroyar skulu hava ein uttanríkisráðharra, tí hesin møguleikin er longu til staðar og skal vera upp til hvørja einstaka samgongu at avgera.

Formaður Sambandsfloksins er eisini ímóti, at grindadráp verður nevnt í stjórnarskipanarlógini, og serliga er tað orðingin "nú reka menn hval á land upp", ið ikki hóvar sambandsformanninum.

Viðurskifti, ið hava við grindadráp at gera, eiga heldur at vera skipað í aðrari lóg, metir Sambandsflokkurin í sínum minnilutaáliti.

Hvørki Landsbankin ella Búskapargrunnurin eiga at verða nevnd í stjórnarskipanarlógini sambært Kaj Leo Johannesen.